> *“Hvat høvdu tey forvæntað? Eg veit hvat tey vildu hava – okkurt lítið lort við eini fjøður í reyvini. For helviti – eg eri Piaf!”*
> (úr leikinum)

Høvuðsleikarin:

# Jytte syngur Piaf – á føroyskum

Frá byrjan var Jytte Joensen greið yvir, at tað mátti verða gjøgnum sangin, hon skuldi liva seg inn í høvuðsleiklutin sum Edith Piaf. Tí situr Jytte nú og týðir 12 sangir hjá Piaf úr fronskum til føroyskt

SJÓNLEIKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

– Tú vildi kanska vita, hvør tað er, sum er so ør at siga jatakk til leiklutin sum Edit Piaf?, flennir Jytte Joensen, tá hon verður spurd, um hendan heldur óvanliga høvuðsleiklutin, hon hevur átikið sær. Hví júst hon var vald til leiklutin, dugir Jytte ikki rættiliga at ímynda sær, men hon ivaðist ikki í at siga ja.

– Hetta var ein alt ov stórur kjansur at lata fara framvið, ein tú bara fært eina ferð og so er at taka hann. Eg segði faktiskt ja uttan at blunka, so tað er nústani tað spakuliga gongur upp fyri mær, hvat tað er, eg havi sagt ja til, sigurJytte.

### Gevandi venjing

Sum eitt tað fyrsta gjørdi Jytte sær greitt, at tað er ógjørligt at endurskapa eitt eindømi sum Piaf. Og kanska netupp tí fór hon undir at fyrireika seg á sín heilt egna sera krevjandi hátt. Í løtuni situr Jytte nevniliga og týðir ikki færri enn 12 sangir hjá Piaf úr fronskum til føroyskt.

– Eg var rættiliga skjótt greið yvir, at tað mátti vera ígjøgnum sangirnar, eg onkursvegna mátti liva meg inn í menniskja aftanfyri stjørnuímyndina. Sangurin var hennara máti at úttrykkkja sínar innastu kenslur og seg sjálva, sum menniskja, og tí havi eg lagt meg so tætt at franska tekstinum, sum til ber, sigur Jytte, sum viðgongur, at tað hevur givið henni nógv sálarbrýggj at fáa poetiska franska málið at sita á føroyskum.

– Hinvegin er hetta ein ómetaliga gevandi venjing til leiklutin. Í grundini er tað heldur ikki so torført at finna æðrina í tekstinum, tí Piaf syngur jú um tær heilt stóru kenslurnar sum kærleika, sorg, svik og sakn, ævigtgaldandi kenslur, sum vit øll kenna okkum aftur í, sigur Jytte.

Líka so poetiskur, sangurin hjá Piaf var, líka so bersøgin og grovur var hennar málburður fyri tað mesta. Og týðarin av leikritinum, Hans Torgarð, hevur ikki lagt fingrarnar ímillum. Men hóast slíkur málburður neyvan hevur verið hoyrdur á føroyskum palli fyrr, órógvar hesin parturin av leiklutinum ikki Jytte.

– Primitiva tosingarlagið hjá Piaf var ein máti at yvirliva í einum heimi, sum støðugt royndi at eta burturav henni. Men tosingarlagið var sanniliga eisini eitt útrykk fyri, hvar hon kom frá, og hvør hon var. Tí tykist tað heldur ikki tilgjørt, men gevur seg mest sum sjálvt, heldur Jytte.

### Røddin lykilin til kenslurnar

Jytte ivast onga løtu í, at hennara største avbjóðing í hesum leikinum verður sangurin og at bruka røddina rætt. Longu nú fær hon sangundirvísing frá professionellum fólkum sum Karin Nus og Stamen Stantchev umframt at hon hevur verið á fleiri ræddarskeiðum.

– Røddin er ein ótrúlig megi og eitt tað fremsta amboðið í einum leiki, sum hesum, um tú lærir at brúka hana rætt. Røddin er jú eisini lykilin inn til innastu kenslurnar; tað er har tær heilt stóru kenslurnar eksplodera. Tað vita vit, um vit hugsa um eina barnakonu við verkjum, sigur ljóðsmóðurin og sjónleikarin Jytte Joensen.

Hóast Jytte hevur verið virkin bæði á sjónleikarapallinum og aftanfyri leiktjøldini í mong ár, er hesin høvuðsleikluturin uttan samanbering størsta leikavbjóðingin, hon er farin undir, sigur hon.



*Ein slíkan møguleika fært tú bara eina ferð, og so er at taka hann, sigur Jytte Joensen, sum skal spæla høvuðsleiklutin sum Edith Piaf*

---

Edith Piaf,
Non, je ne regrette rien

## Onki angri eg

*Onki angri eg*
*Onki av øllum eg angri*
*Hvørt eitt vár*
*Hvørt eitt tár*
*Hvørt eitt sár*
*Alt tað var jú í gjár ...*

*Onki angri eg*
*Onki av øllum eg angri*
*Tað er goymt*
*Skrætt úr mær*
*Tað er gloymt*
*Tí tað var tað, sum var*

*Og úr farnari trá*
*Vil eg kynda eitt bál*
*Tveiti minnini á*
*Brenni úr míni sál*

*Ást, sum ongum stóð mát*
*Bæði gleði og sút*
*Ást, sum kostaði grát*
*Alt er nú goldið út*

*Onki angri eg*
*Onki av øllum eg angri*
*Hvørt eitt vár*
*Hvørt eitt tár*
*Hvørt eitt sár*
*Alt tað var jú í gjár*

*Onki angri eg*
*Onki av øllum eg angri*
*Hjarta slær*
*Lívið tað*
*Byrjar í dag*
*Byrjar saman við tær*

Týtt úr fronskum, Jytte Joensen

---

# Gamal dreymur

*Við føroysku uppsetingini av sangleikinum Piaf í Sjónleikarahúsinum verður ein gamal dreymur hjá Gullu Øregaard til veruleika*

Tað eru eini 16 ár síðani Gulla Øregaard á fyrsta sinni hugsaði um at fáa sett leikin um Edith Piaf upp í Sjónleikarahúsinum. Eftir at hava lisið leikritið, hildu hon og onnur í Havnar Sjónleikarafelag kortini ikki, at tey vóru búgvin at taka uppgávuna á seg.

Men Gulla slepti ongantíð dreyminum.

– Nú tá ið sjónleikarfelagið veruliga er farið í gongd við at seta ambitiónir upp sum drívmegi, hildu vit, at løtan var komin at smíða, skapa og syngja okkum inn í hjarta á tí, sum er gevandi sjónleikur, sigur Gulla.

Piaf verður sostatt fyrsta stórverkið, sum verður framført í nýskipaða og umvælda Sjónleikarahúsinum, sum fólkini í húsinum stremba eftir at gera til eitt meir sjónligt mentanarligt vakstrarhús í býnum.



Tað er ikki av tilvild at tey hava valt at byrja hetta nýggja skeiðið hjá Sjónleikarahúsinum við leikinum um Edith Piaf

– Tað var ein tilvitað avgerð at lýsa, hvat tað veruliga kostar at vera skapandi, og hvat listafólk handan tjaldið hava at dragast við. Hóast mikla persónliga kvøl, megnaði Piaf sum fá onnur altíð at møta áskoðararnum glógvandi og rein. Slíkt er sjáldsamt og kann ikki annað enn at geva okkum øllum sterkan íblástur, sigur Gulla.

> *“Man vil ikki at tað skal enda. Showið er liðugt ... og so er man einsamallur aftur”*
> (Piaf í leikinum Piaf)